# Prestur uppvaksin í Irak skal setast í Føroyum

**Í dag, hósdag, kemur nýggjur prestur til Føroyar, og er talan um 35 ára gamla Patrick de Neegaard, sum er føddur og uppvaksin í Irak. Nýggi presturin, sum hevur lokið teologiskt prógv frá lærda háskúlanum í Århus, skal innsetast í prestastarvið í Vági**

NÝGGJUR PRESTUR
*Hans Kárason Mikkelsen*
*mikkels@fas.harvard.edu*

Fimm umsóknir vóru til prestastarvið í Vági, og hevur Vágs bygd ikki havt fastan prest í longri tíð. Patrick de Neegaard, sum er danskur statsborgari, varð valdur millum umsøkjararnar, sum allir eru danir.

Patrick de Neegaard hevur danskan pápa, og mamman er úr Irak. Presturin er føddur og uppvaksin í Irak saman við kristnari familju, men tá hann varð 14 ár, flutti familjan til Danmarkar.

Patrick de Neegaard hevur lisið teologi við lærda háskúlan í Århus, og varð hann liðugur í fjør. Prestaútbúgvingin tekur umleið fimm til seks ár, og tískil var Patrick de Neegaard síðst í 20'unum, tá hann byrjaði at lesa til prest.

Áðrenn Patrick de Neegaard fór at lesa teologi, hevur hann arbeitt fyri Sameindu Tjóðir. Tað gjørdi hann í samband við leiklutin hjá dønum í Sameindu Tjóðum.



*Hans Jacob Joensen, bispur, hevur endaliga orðið, tá nýggir prestar skulu setast í Føroyum. Og nú hevur bispur latið dyrnar upp fyri 35 ára gamla Patrick Denegaard, sum er føddur og uppvaksin í Irak, har hann hevur búð við danska pápanum og iraksku mammuni, til hann varð 14 ár. Patrick Denegaard verður prestur í Vági, og hann kemur til Føroyar í dag*

### Skal til roynd

Men nú er Patrick de Neegaard altso vorðin prestur, og er prestastarvið í Vági hansara fyrsta sum prestur. Men áðrenn Patrick de Neegaard verður innsettur sum prestur í vági, skal hann til ta sokallaðu bispaeksamiuna.

– Hann skal skriva eina ritgerð um okkurt givið evni við støði í bíbliuni, og hann skal eisini halda eina prædiku. Harumframt skal hann sjálvandi undirskriva prestalyftið, og eisini fortelja okkum, hvussu hann ætlar at undirvísa konfirmantunum, sigur Hans Jacob Joensen, bispur.

Hans Jacob Joensen vísir á, at tað er vanligt, at fólk standa slíka roynd, men at tað ikki er ókent, at fólk ikki megna uppgávuna.

– Tað er mín uppgáva sum bispur at tryggja, at presturin, sum er innstillaður til eitt starv, at hann røkir leiklutin sum luthherskur prestur væl. Tað er hetta, sum er endamálið við bisparoyndini, sigur Hans Jacob Joensen, bispur.

Bisparoyndin hjá Patrick de Neegaard er fríggjadagin, og tekur hetta allan dagin. Patrick de Neegaard er sum nevnt danskur statsborgari, og hann hevur búð í Danmark í nógv ár. Tískil skuldi ongin málsligur trupulleiki stungið seg upp undir bisparoyndini.

– Tað er vanligt, at danir og aðrir norðurlendingar søkja starv sum prestar í Føroyum, og norðurlendskt mál verður sjálvandi góðtikið, sigur Hans Jacob Joensen, bispur.

### Húðlitur ongan týdning

Heri Joensen, prestur í Vesturkirkjuni, sigur í sambandi við útlendingar, sum søkja prestastarv, at tað teir skulu vera vælkomnir.

– Tað kann vera líkamikið, hvar umsøkjarin er frá, og hvørjan húðlit hann hevur. Tað verður tikið væl ímóti alíkavæl. Og tað týdningarmesta er helst, hvar umsøkjarin stendur kirkjupolitiskt; tað vil siga, um presturin er frísinnaður ella fundamentalistiskur, ella hvat hann er. Vit skulu bert taka okkum av, hvussu ein útbúgvin prestur hevði virka sum prestur fyri einari meinigheit, óansæð húðlit og tílíkt, sigur Heri Joensen, prestur í Vesturkirkjuni.

Forkvinnan í kirkjuráðnum í Vági, Kitty Leo, er samd við hesum sjónarmiði og leggur aftrat, at tá tey hyggja eftir umsøkjarum til prestastarvið í Vági, so verður dentur lagdur á hugburð og persónligheit.

– Vit fara ikki at seta ein mann eftir húðliti, tað sigur seg sjálvt. Vit hyggja eftir, hvat maðurin hevur at bjóða uppá, og síðani taka vit støðu. Tað, sum vigar mest í eini umsókn til prest, er hugburður og persónligheit. Patrick de Neegaard kom við tí kristnu grundgevingini, at hann er persónligur kristin. Hann var eisini tann presturin, sum vit dámdu best, og sum fall okkum best fyri millum umsøkjararnar, sigur Kitty Leo, forkvinna í kirkjuráðnum í Vági.

### Drúgv umsóknargongd

Patrick de Neegaard søkti prestastarvið í Vági einaferð í apríl, og er tað ein drúgv mannagongd, sum skal tryggja, at ein góður prestur verður valdur.

Fyrst samlar Kirkjumálaráðið allar umsóknirnar saman, og skulu hesar liggja í eina viku ella so fyri at tryggja, at allar koma við. So vera umsóknirnar sendar til bisp og kirkjuráðið, í hesum førinum kirkjuráðið í Vági.

Kirkjuráðið viðgerð síðani allar umsóknirnar í trúnaði, og sendir eitt tilmæli til bisp um, hvønn prestin kirkjuráðið heldur vera best egnaðan til starvið. Til prestastarvið í Vági vórðu tríggir prestar innstillaðir fyri bispi, og vóru allir til samrøðu hjá kirkjuráðnum

Bispur tekur sær av endaligu umsóknargongdini, og sendir hann eitt tilmæli til Kirkjumálaráðið um, hvør skal setast. Eitt tilmæli verður eisini sent frá próvstinum, men tað er bispur, sum hevur síðsta orðið.

Tað er sjáldan, at bispur gongur ímóti tilmælinum hjá kirkjuráðunum, og tað gjørdi bispur heldur ikki, tá Patrick de Neegaard varð nummar eitt í Vági.

– Tað finst onki dømi, har hann, ið er innstillaður, er vrakaður, sigur Hans Jacob Joensen, bispur, og vísur á, at tað skulu heilt serligar umstøður til fyri at ganga ímóti innstillingum frá kirkjuráðunum.

Tað er annars trupult nokk frammanundan at fáa starv sum prestur, serliga í Danmark. Kitty Leo, forkvinna í kirkjuráðnum í Vági, sigur, at hetta helst er ein av orsøkunum til, at Patrick de Neegaard søkti prestastarv í Føroyum.

– Men hetta er ikki høvuðsgrundgevingin fyri at søkja starv í Føroyum, tí Patrick de Neegaard vildi fegin royna nakað nýtt, og tískil søkti hann prestastarvið í Vági, sigur Kitty Leo.

Kitty Leo vísur eisini á, at Patrick de Neegaard var fegin um at hoyra, at tað varð hann, sum skal røkja prestastarvið í Vági.

Patrick de Neegaard verður prestavígdur sunnudagin, og hann byrjar sum prestur í Vági um miðjan september.



# Fótbólturin dregur

**Olja ella ikki. Tað er ikki júst tað, sum dregur fólk til føroyska framsýningarbásin á oljumessuni í Aberdeen. Tað er harafturímóti komandi stórdysturin í fótbólti millum Skotland og Føroyar. Vitjandi kunnu vinna ferð til Føroya, um tey tippa rætta úrslitið av dystinum, og tippingin gongur sum heitt breyð**

OLJUMESSA
*Jan Müller*




**Sosialurin, Aberdeen:** Hóast Føroyar enn ikki av álvara eru komnar á altjóða oljukortið – eftir fýra brunnar er enn einki lønandi oljufund gjørt – so er áhugin fyri føroyska framsýningarbásinum á oljumessuni í Aberdeen óvanliga stórur.

Orsøkin er, at øll tey túsundtals vitjandi hava møguleika at tippa um úrslitið av komandi landsdystinum millum Skotland og Føroyar, og harvið verða við í kappingini um ferðir til Føroya við Atlantic Airways.

Og tær tríggjar tippingarskálirnar drega til sín sum magnetur. Her í Skotlandi verður nógv skrivað og tosað um fótbóltsdystin millum grannatjóðirnar báðar, og vitjandi á oljumessuni streyma til føroyska básin at leggja síni visitkort í eina av skálunum. Tú kanst tippa, at Skotland vinnur, at Føroyar vinna ella javnleik.

### Borgarstjórar tippa

Og tað er júst javnleikur, sum nýggi borgarstjórin í Aberdeen, Lord Provost, John Reynolds tippaði, tá ið hann og konan vitjaðu á føroyska básinum týsdagin.

– Eg eri diplomatiskur og rokni avgjørt við einum jøvnum dysti, nú vit hava hoyrt og sæð, hvussu væl føroyingar klára seg í fótbólti.

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, tók ímóti skotska starvsbróðrinum. Eisini hann nýtti høvið til at tippa.

– Føroyar vinna við einum máli.

Fyri at fáa javnvág í tippingina legði konan hjá Lord Provost sítt kort í skotsku vinnaraskálina. Og soleiðis verða hundraðtals visitkort løgd í skálirnar.

Hesin so týdningarmikli steðgur við føroyska framsýningarbásin gevur nevniliga føroyska umboðunum tað høvið, sum er so ynskiligt at koma á tal við tey vitjandi.

Hóast tað ikki er so nógv at práta um og vísa á, tá talan er um positiv úrslit frá leitingini eftir olju og gassi á føroyska landgrunninum, so nýta teir umleið 20 føroyingarnir á básinum høvi til at greiða frá um Føroyar og menningina.

### Elttør er við

Við í føroysku delegatiónini er eisini Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum.

Hann hevur so havt møguleikan at hitta fleiri framstandandi fólk í altjóða oljuvinnuni og at kunna seg um útviklingin - gongdina á tí stóra oljuøkinum. Eitt nú luttekur Hetland við einum stórum bási á oljumessuni. Eins og vit føroyingar seta hetlendingar eisini sínar vónir til nýggj oljufund á Atlantsmótinum, millum Heltand og Føroyar.

Millum mongu gólkini, landsstýrismaðurin nýtti høvi at tosa við, vóru fimm oljuserfrøðingar út tí lítla, men ovurríka oljulandinum í Miðeystri, Qatar, sum eru á skeiði í Aberdeen.

– Tað er hugaligt og gevandi at práta við hesi ungu og vitandi fólkini, sum liva mitt í oljuresinum, sigur landsstýrismaðurin, sum tó ásannar, at útlendski áhugin fyri Føroyum sum oljutjóð sjálvandi er sera avmarkaður, nú einki lønandi fund er gjørt.

Møguleiki hevur tó verið hjá landsstýrismanninum og øðrum føroyingum at lurta eftir, hvat rørist í oljuverðini og her ikki minst, hvørjar avbjóðingar standa fyri framman.

Ein av hesum avbjóðingum, sum verður umrødd á ráðstevnuni her í Aberdeen, er fyri okkum føroyingar sera viðkomandi spurningurin um at betra seismisku tøknina til tess at kunna síggja gjøgnum basalt og síðani eisini at kunna bora ígjøgnum basalt skjótari og lættari.

### Nýggjur áhugi

Mongu áhugaverdu fyrilestrarnir á oljuráðstevnuni snúgva seg eisini um framtíðar fígging av oljuleiting og annars um tær broytingar, sum eru í Norðsjónum, har smærri og nýggj oljufeløg taka yvir uppgávurnar frá teimum stóru oljufeløgunum.

Eyðun Elttør skal eisini hava fundir við oljufeløg, meðan hann er í Aberdeen. Eitt nú skal hann hitta umboð fyri BP. Hesin oljurisin hevur bundið seg til at bora tveir brunnar afturat á landgrunninum.

Annars er ikki gott at vita, hvat landsstýris-maðurin hevur við sær skjáttuni í Aberdeen. Tað er hugsandi, at partur av »herferðini« í tí europeiska oljuhøvuðsstaðnum er at birta undir áhugan fyri eini nýggjari avbjóðing har norðuri á landgrunninum.

Men sum sagt – mitt í øllum oljumeldrinum – so er tað fyrst og fremst fótbóltsdysturin millum Skotland og Føroyar, sum er í fokus á føroyska básinum í Aberdeen.



# Endiliga góð tíðindi fyri alarar

**Prísurin á laksi er nógv hækkaður seinastu vikurnar og mett verður, at hækkingin fer at standa við, í hvussu so er í eina tíð afturat**

LAKSAPRÍSIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er endiliga gott nýtt til alarar: Laksaprísirnir eru á veg uppeftir aftur.

Prísurin á laksi er alsamt batnaður í summar og hann kvinkar uppeftir hvørja viku.

Rói Egholm á Farex sigur, at tað er trupult at nevna ávísar prísir, men at príshækkingin hevur verið støðug seinastu vikurnar.

Men hann sigur, at enn er prísurin ikki komin upp um framleiðslukostnaðin. Tað skal nakað til enn.

– Tað, vit kunnu vóna, er at príshækkingin stendur við, so at tað aftur fer at loysa seg at ala.

Hinvegin kann leggjast afturat, at aðrir, sum gera langtíðarmetingar um marknaðin, halda, at prísurin fer at hækka í hvussu so er tað næsta árið, ella kanska meir.

Sostatt eru útlit fyri, at peningur aftur fer at renna í kassarnar hjá alarunum, um enn tað verður smáligt fyrstuni.

Rói Egholm sigur, at tað er ilt at meta um, hví prísirnir hækka nú.

Men hann heldur, at ein orsøk er, at útlitini fyri búskapirnir niðri í Evropa eru bjartari nú, enn tey hava verið. Framrokningar boða frá meiri vøkstri aftur og tað ger fólk bjartskygdari og kann gera sítt til, at gongd aftur kemur á marknaðin.

Hinvegin hevur summarið verið óvanliga heitt og tá keypa fólk ikki fisk. Nú er kaldari aftur og tað kann eisini gera sítt.

Onkur annar metir, at tað kann eisini hava ein týdning, at Norðmenn eru komnir langt við ætlanum sínum at leggja 30.000 tons av laksi á gloymslu, fyri at gera útboðið minni.

Nøkur, ið fáast við marknaðin siga, at bara í farnu viku, hækkaði prísurin eini 20% og seinastu tveir mánaðirnar er hann hækkaður eini 40%.

Rói Egholm sigur, at í Føroyum hevur ILA sjúkan gjørt, at tað hevur verið neyðugt at taka nógvan fisk av neyð, áðrenn hann hevur fingið røddu støddina og tí ber ikki altíð til at samanbera prísirnar.

Men hann sigur, at prísurin hevur verið óvanliga lágur, men at hann gongur uppeftir nú og hann vónar, at prísurin so við og við fer at arbeiða seg har upp, at tað aftur kemur búskapur í alingina.

– Prísurin skal yvirhøvur upp á einar 19-20 krónur kilo, áðrenn tað fer at geva yvirskot aftur og enn manglar nakað í. Prísurin skal nakað væl longri upp, áðrenn tað loysir seg, men nú gongur rætta vegin, sigur hann.